## Eitt ár síðani skrædlið

Í dag er eitt ár, síðani amerikanski íløgubankin Lehman Brothers kunngjørdi, at hann var frarin á húsagang, og hóast tey flestu væntaðu, at stjórnin fór at bjarga bankanum, valdi hon at lata hann fara. Fallið elvdi til iva og stúran í USA og aðrastaðni. Bankarnir mistu álitið á hvør øðrum, partabrævavirðið fall í stórum, fyritøkur fóru á heysin ella repaðu og koyrdu fólk til hús. Fleiri væntaðu, at tað, sum hendi í 1929, fór at endurtaka seg, men so varð ikki, og tær seinastu vikurnar hava fleiri lond boðað frá, at afturgongdin er steðgað, og at tað gongur tann rætta vegin.




## Bóndi setti eld á

Í Grikkalandi hevur løgreglan skuldsett ein bónda fyri at hava kynt tann ógvusliga skógareldin, sum legði fleiri bygdir uttan fyri høvuðsstaðin Athen í oyði í síðsta mánaði. Ákæruvaldið kunngjørdi í gjár, at tað hevur skuldsett tann 59 ára gamla bóndan fyri eldáseting. Sum skilst var talan um ósketni, tí sambært ákæruritinum kyknaði skógareldurin, tá maðurin setti eld á eitt vespureiður uttan fyri býin Grammatiko. Bóndin noktar seg sekan í eldáseting, men verður hann dømdur sekur, kann hann fáa upp í fimm ára fongsul, skrivar AFP. Umleið 300 hús fóru upp í royk í skógareldinum.

# Stórur áhugi fyri Føroyum á oljuráðstevnu

**OFFSHORE EUROPE**
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*
*Myndir: Unn Poulsen*

Uttanríkisráðið og Oljuvinnufelagið hava samskipað føroysku luttøkuna á stóru oljuvinnuframsýningini Offshore Europe ´09, sum hevur verið í Aberdeen í hesum døgum. Framsýningin lat aftur fríggjadagin, og fyrireikararnir meta, at framsýningin hevur haft fleiri enn 40.000 vitjandi. Framsýningin er sostatt tann størsta nakrantíð.

Offshore Europe er ein framsýning fyri undirveitarar til altjóða oljuídnaðin, hvørs endamál er at lata partar í vinnuni hittast, endurnýggja avtalur og skapa nýggj sambond.

Eins og undanfarin ár luttóku føroysku fyritøkurnar við einum felags bási, sum aftur í ár lá væl fyri beint við høvuðsinngongdina til framsýningina. Føroysku fyritøkurnar boða frá nógvum vitjanum og virksemi í básinum hesar dagarnar, framsýningin hevur verið. Vinnufólk og tíðindafólk úr øllum heiminum hava serliga verið áhuga í boringini, sum eftir ætlan skal fara fram undir Føroyum komandi vár.

Føroyskt vinnulív var umboðað av Atlantic Airways, Atlantic Supply Base, Shefa og Runavíkar Havn saman við umboðum frá Uttanríkisráðnum, Oljuvinnufelagnum og Jarðfeingi. Føroyska luttøkan á framsýningini er minni enn undanfarin ár, men luttakandi føroysku fyritøkurnar hava fingið nógv burturúr, og tær eru væl nøgdar við framsýningina, sigur ein av samskiparunum, Unn Poulsen, úr Uttanríkisráðnum.











